# Málrok tá dómarafelagið kom í stríð við seg sjálvt

*NSÍ og FS Vágar hava bæði knívin á barkanum, og B36 tykist hava undanvindin, sum skal til, tá meistaraskapurin skal vinnast*



*Eins og restin av B36-liånum hevur Håkan Lundholm havt undanvind seinastu tíðina*
***Mynd: Jonhard Hammer***

Undirhald í fótbólti verður ofta gjørt upp í, hvussu nógv mál verða skorað. Í so máta var sjeynda umfar í 1. deild, sum var spælt sunnudagin, væl við, og at føroyska summarveðrið skikkaði sær væl, gjørdi tað uppaftur hugaligari at taka lut og hyggja at.

Tað er ikki á hvørjum degi, at tað verða skorað 32 mál í einum og sama umfari. Hetta er kortini ikki met. Í átjanda og síðsta umfarinum í 1998 vórðu skorað ikki færri enn 39 mál. Ta ferðina vann HB 10–1 í Fuglafirði, B36 sendi VB suður við 8–2 tapi, B68 vann 3–2 á NSÍ, KÍ vann 5–2 í SUmba, og GÍ kom av Sevmýri við 5–1 sigri. Í tólvta umfari8num hetta sama árið vórðu 33 mál skorað. Ta ferðina endaðu tveir dystir 10–0.

## B36 hevur tyngdina

Fitt av spenningi var, um tað fór at eydnast B36 at fáa nakað við úr Runavík. Oddaliðið hevði tapt móti KÍ og teir vóru sendir úr steypakappingini. B36 var kroyst eina løtu í Runavík. Tað lá í luftini, at teir skuldu missa øll stigini, sum teir í yvirtíðini í 1. hálvleiki so at siga høvdu fingið inn um stokkin.

Tá B36 í 1997 vann FM var tað ofta í síðstu løtu, at teir avgjørdu. Hjá mongum man dysturin í Vági tað árið standa sterkur í huganum. Akkurát soleiðis tørnaði tað út móti NSÍ. Og tað ber boð um, at B36 fer at røkka langt í ár.

Merkisvert var tað eisini, at teir vunnu í Runavík við fleiri monnum á liðnum, sum ikki hava spælt nógv í 1. deild. Jens Kristian Hansen spældi bara eina lítla løtu, Ronnie Samuelsen og Herbert í Lon Jacobsen vóru leikbannaðir, og Carl H. Høgnesen er skaddur.

Tað verður ofta tikið til, at tað er á beinkinum, at eitt lið vísir sína sonnu styrki. Hesa ferð royndu D. P. Johansen, Rógvi Róin og Karl Leonsson seg, Gunnar Nielsen og Klæmint Matras komu inn, og B36 fekk trý stig.

Komandi leygardag eru tað grannarnir úr HB, sum bíða í Gundadali.

## Fyrstu ferð í fimtan ár

Dómaraverkfallið varð avlýst. Einki er at ivast í, at teir í HB høvdu einki havt ímóti at havt frívikuskifti. Frá næstsíðsta sunnudegi og fram til komandi leygardag hava teir fimm dystir á skránni. Sjálvandi setur hetta síni spor – tað hevði tað eisini gjørt hjá væl trimmaðum yrkisspælarum – og tí hevði komið væl við at hvílt eina lítla viku, áðrenn teir í annaðkvøld skulu vestur í Vágar.

Men HB fekk ikki møguleika at hvíla, og so fór B68 av stað við øllum stigunum. Í blaðnum leygardagin var eingin umrøða av dystunum sunnudagin. Tey, sum hava atgongd til internet útgávuna, kundu leygardagin lesa, at nógvu tey seinnu árini hevur HB vunnið annan hvønn heimadyst móti B68, og aðru hvørja ferð hevur tað verið javnleikur.

B68 er næstovast, og at teir fyri fyrstu ferð í fimtan ár megnaðu at fáa øll stigini í Gundadali móti HB er ábending um, at teir ætla sær at hanga í.

Hjá HB stendur nógv upp á spæl teir næstu dagarnar. Í annaðkvøld skulu teir til Sørvágs, og leygardagin hitta teir B36. Um HB vinnur báðar dystirnar, eru teir bara eitt stig aftanfyri B36.

## Drúgvir vágbingar

Tað er ongantíð komið fyri, at VB hevur vunnið heiðursmerkir í landskappingini. Onkuntíð hava teir verið millum tey fremstu fram móti summarsteðginum, men so eru teir smokkaðir. Nú er VB á triðja plássi. Merkisvert var tað, at teir eftir avhølvingina móti HB hósdagin megnaðu at bretta sær á móti GÍ.

Hópurin hjá VB er breiður, og leygardagurin er aftur lykladystur á skránni. Tá skulu teir spæla á Svangaskarði.

Johan Nielsen hevur aftur og aftur undirstrikað, at gøtumenn kunnu ikki rokna við betri úrsliti enn um miðjuna. Tapið í Vági hevur við sær, at GÍ í fyrstu atløgu hevur mist takið í stríðnum um heiðursmerkir. Onkur av GÍ spælarunum hevur nevnt, at tað liðið verður FM vinnari, sum megnar at vinna hvørja ferð tíggju tey seinastu umførini.

Gøtumenn eru onkuntíð áður komnir aftanífrá, men uppgávurnar fram móti summarsteðginum eru ikki léttar. Leygardagin og mánadagin skulu teir til Sørvágs – fyrst til landskappingardyst og síðani til steypadyst – og so fáa teir vitjan av báðum teimum fremstu liðunum – fyrst B68 og so B36.

Klaksvíkingar tykjast hava funnið seg sjálvar á vøllinum. Nógv hevur verið sagt og skrivað um tað, ið hevur gingið fyri seg uttanfyri vøllin. Um nevndin í KÍ veit, hvør maðurin er, sum skrúvaði høvdið av og slerdi annan linjudómaran dýra biðjudag, so áttu teir at sent rokningina uppá, ið kappingarnevndin hjá FSF hevur útskrivað, til viðkomandi og møguliga avrit í Norðlýsið! Tað eigur at staðfestast, at slíkur ørvitis atburður hevur avleiðingar.

## Kroystu feløgini

Á Sandi hava teir fleiri ferðir endurtikið, at teir halda seg hava so góða manning, at niðurflytingin ikki eigur at koma upp á tal. Úrslitið móti FS Vágum bendir á, at nakað er um tosið.

Sumbingar hava ikki mist svøvnin, sjálvt um teir taptu stórt í Klaksvík. Tá teir spæla móti stóru feløgunum á útivølli, er tað merkisvert, at fleiri av føstu monnunum sita uttanfyri. Bæði teir, sum hava smásnuddir, og teir, sum á kortkontoini eru fram ímóti at fáa leikbann.

Tað er týðuligt, at sumbingar eru greiðir yvir, hvørjar uppgerðir eru lykladystir hjá teimum. Komandi leygardag er ein sovorðin á skránni. Tá NSÍ kemur suður á Krossin, fara sumbingar heilt víst at spæla við besta fólkinum.

Hjá NSÍ er illa vorðið. Avrikini eru ikki sannførandi, og marginalirnir eru ikki á teirra síðu. NSÍ hevur tapt fýra dystir á rað, og teir hava rættuliga knívin á barkanum leygardagin.

FS Vágar hevur framvegis fyrsta sigurin til góðar. Í nógvum landskappingardystum hevur spælið ikki verið av leið. Spurningurin er hvussu leingi teir megna at halda høvdið høgt, tá úrtøkan er so lítil. Undan summarfrítíðini skulu teir spæla móti HB, GÍ og KÍ.

## Politikkurin

Málríkasta umfarið í tvey ár fer ivaleyst at verða minst fyri poilitikkin heldur enn undirhaldið á vøllunum.

Misnøgdin við avgerðina hjá kappingarnevndini, sum segði, at KÍ skuldi fáa tíggju túsund krónur í bót, tí ein áskoðari hevði sligið ein hjálpardómara í búkin, hevði í fyrstu atløgu við sær, at dómararnir vóru avgjørdir og boðaðu frá, at teir fóru ikki at døma í vikuskiftinum. Okkum dámar væl at sammeta okkum við útlendingar. Undan vikuskiftinum var støðan átøk tí, sum plagar at vera at frætta úr Italia. Tað endaði, sum tað plagar at enda í Italia, og einki er at ivast í, at orsøkin til niðurstøðuna var tann sama, sum hon plagar at vera t. d. í Italia.

Lobbyisma verður ofta fatað sum eitt illavorðið orð. Hugtakið verður nú á døgum góðkent sum ein veruleiki, sum ikki er illavorðin. Fótbóltslobbyisman undan vikuskiftinum hevði við sær, at fótbólturin varð avgreiddur, og tað gleðast øll um. Eftir stendur eitt dómarafelag, sum liggur í stríði við seg sjálvt. Tað er óheppið.

JH



Tjaldrið var millum nýggju bátarnar, sum stóðu seg sera væl í kappróðrinum á norðoyastevnu.

Ikki færri enn níggju nýggir bátar vóru at siggja til fyrsta FM roðurin, sum millum annað verður mintar av, at tað eydnaðist vestmenningum at vinna róðurin hjá 10-mannafórunum.

Í mikudagsblaðnum hava vit stóra frásøgn frá kappróðrinum í Klaksvík



# NSÍ noktaði fyri at arbeiða yvirtíð

*1. deild: Leikliga var eingin munur á botni og toppi, men B36 hevði í síðsta enda ta tyngdina, sum toppliðini oftast hava*



*Magni á Lakjuni var atvoldin til avgerandi málið í dystinum, sum varð skotið eftir at runavíkingarnir vóru hildnir uppat við at spæla*
***Mynd: Jonhard Hammer***

Sambært reglarnar verður ein fótbóltsdystur spældur tvær ferðir trý korter. Hetta er minsta markið. Tað er upp til dómaran at gera av, hvussu nógv hann ger av at leggja afturat vanligu leiktíðini.

Felags fyri bæði vanligu leiktíðina og ta tíðina, sum dómarin leggur afturat, er, at málini, sum verað skorað, telja eins nógv.

At tað er týdningarmikið at stríðast bæði í vanligu leiktíðini og í tí tíðini, sum dómarin leggur afturat, er ein veruleiki. sum fótbóltsspælararnir hjá NSÍ tykjast hava ilt við at síggja í eyguni.

Hetta var sjón fyri søgn sunnudagin.

Tá teir fyrstu 45 minuttirnir vóru farnir, var framvegis einki mál komið. Dómarin legði tveir minuttir afturat, og í eykatíðini skoraði B36 tvær ferðir.

Tá 2. hálvleikur var 45 minuttir gamal, var støðan 2–2. Dómarin legði fýra minuttir afturat, og í yvirtíðini skoraði B36 eitt mál. Harvið vóru øll trý stigini í B36 viðførinum.

## Gylta løtan

At teir í NSÍ iðraðu seg bæði bláar og gular um, at teir einki fingu burturúr, var einki at siga til.

NSÍ megnaði í 2. hálvleiki at taka tað aftur, sum teir høvdu klossað burtur í yvirtíðini í fyrra umfarinum. Eddie Mikkelsen, sum hesa ferð var ytstur á miðvøllinum í vinstru, skoraði bæði málini. Hitt fyrra eftir langan diagonalbólt úr høgru. Møguleikin tóktist burtur, men Dánial P. Johansen, sum hesar síðstu ferðirnar hevur havt møguleikan í høgra verjuborði, var óskettin og gav bóltin burtur til miðvallaran. Eddie takkaði fyri og sendi flatt framvið málverjanum.

Útjavnandi málið átti Gert Langgaard, sum er NSÍ maðurin við nógv størstu álopsligu tyngdini, uppspælið til. Hann sneiddi seg til baklinjuna í høgru, legði út frá handara stólpa, har Eddie Mikkelsen smekkaði upp undir nærru samankomingina.

So var 2–2, og kropsburðurin og áræðið hjá heimamonnunum bendu á, at tað snúði seg um, um NSÍ fór at fáa eitt ella trý stig.

At tað ikki gekk, sum tað kanska kundi roknast við, boðar frá, at NSÍ arnir eru ov tunnir. Bæði í verjupartinum, har teir ov ofta lata mótstøðumenninar vera ov leysar, og í álopspartinum, har teir alt ov ofta missa bóltin í uppspælinum.

Hvørki liðið megnaði serliga skipað spæl, men onkra ferðina hekk tað eina løtu saman hjá NSÍ á jørðini, og tá var tað, at teir myndaðu síni bestu álop. Men alt ov ofta var talan um langar sendingar, og ofta høvdu longu sendingarnar skeiva adressu ella onga adressu.

## B36 úrtøkan

B36 spælararnir og viðhaldsfólkini vóru ovurfegin, tá tey fóru til hálvleiks, og tey vóru ovurfegin, tá tey fóru úr Runavík. Bæði í 1. og í 2. hálvleiki stóð nógv á, men kortini riðu gestirnir stormin av.

Sigursmálið átti NSÍ málverjin sín part í. Hann fór út eftir høgum innleggi úr høgru, men bólturin fór eitt sindur í hitt borði. Máverjin tóktist ætla at verja uttanfyri málteigin, og so var tað, at Magni á Lakjuni lyfti aftur um seg sjálvan og upp um málverjan. Bjarni Prior, sum hevði haltað illa alla tíðina, rann so frægt, at hann kundi stýra bóltinum síðsta teinin um strikuna, og so var fagnaðurin stórur.

B36 fagnaðurin var serliga stórur, tá teir settu hol á. Miðvallarin Jan Guttesen, sum man vera ein tann týdningarmiklasti maðurin á B36 liðnum, er ikki altíð so eyðsýndur, tá hann arbeiðir og stríðist. Bara eina ferð áður hevði hann skorað. Men tað sást ikki, tá hann tilspældi sær sjálvum møguleikan at gera fyrsta málið. Jónstein Petersen misti í uppspælinum hjá NSÍ til Håkan Lundholm, hesin stakk inn um í høgru, Jan Guttesen rann frá tveimum, fór framvið málverjanum og rullaði bóltin um strikuna.

NSÍ menninir vóru so skelkaðir, at teimum ikki eydnaðist at halda tætt til steðgin, at teir ikki tóktust geva sær far um, at B36 skoraði eitt mál afturat. Magni á Lakjuni legði úr vinstru flatt innum verjuna, og Håkan Lundholm, sum var í álopinum saman við Bjarna Prior, var púra leysur, tá hann sendi framvið málverjanum og í handara síðunetið.

## Órudduligt

Onkuntíð hevur fótbóltsspælið verið betri, enn tað var í Runavík hesa ferð. Hvørgin miðvøllurin megnaði at fáa tað at hanga saman serliga leingi. Bólttapini vóru nógv báðar vegir, og uppløgdu málmøguleikarnir vóru fáir.

B36 saknaði fleiri at føstu monnunum. Bjarni Prior var týðuliga skaddur. Mikkjal Thomassen fór út, tí hann var skaddur, men so leingi hann var í miðverjuni var hann saman við Egili Zachariasen, sum hesa ferð var liðformaður, og Karl Leonsson, sum ikki hevur verið á besta liðnum í fleiri ár, partur av stinnastu B36 ketuni.

Eitt sindur undarligt kendist tað, at Jens Kristian Hansen sat á beinkinum mest sum alla tíðina. Eftir 1. hálvleik var eyðsýnt, at álopsparturin var ov tunnur. Tað hevði verið upplagt at tikið skadda Prior út, at sett Jákup á Borg, sum stíddist á miðvøllinum fram í álopið, og at sett Jens Kristian Hansen inn á miðvøllin.

Men B36 venjaran valdi at loysa trupulleikarnar øðrvísi, enn á mest upplagda møguleikan. Liðið hjá honum vann, og so er torført at seta niður á venjaran.

NSÍ tapti, tí heimamenninir gloymdu at spæla alla tíðina. Avleiðingarnar av tí vóru so dyggar, at læran kann roknast við at sita í, tá teir komandi leygardag skulu spæla botndyst í Sumba.

JH

## NSÍ-B36 2-3 (0-2)

0-1: Jan Guttesen 45.
0-2: Jan Guttesen 45.
1-2: Eddie Mikkelsen 49.
2-2: Eddie Mikkelsen 65.
2-3: Bjarni Prior 90.

## NSÍ:

Rúni Joensen – Brynjolvur Nielsen, Dánial Hansen, Arnfinn Langgaard, Jónstein Petersen – Sonni L. Petersen, Kári Hansen, Sjúrður Jacobsen, Eddie Mikkelsen – Gert Langgaard, Ian Højgaard

## B36:

Tróndur Vatnhamar – Dánial P. Johansen, Mikkjal Thomassen, Egil Zachariasen, Karl Leonsson, Magni á Lakjuni – Jan Guttesen, Rógvi Róin, Jákup á Borg – Bjarni Prior, Håkan Lundholm

# Ójavnt stríð

*2. deild: Hóast LÍF vóru í yvirtali í 70 minuttir, so var tað um ræppið, at TB megnaði at fáa stig burturúr heimadystinum*

JÁKUP MØRK

TB-LÍF 2-3 (0-1)

Vónirnar hjá TB um at endurvinna oddasessin fingu eitt rættuligt skot fyri bógvin longu tíðliga í fyrra hálvleiki í dystinum móti LÍF.

Tað vóru ikki spældir meira enn einir 20 minuttir, so varð maður rikin av vølli, og eftir hetta mátti TB so stríðast móti yvirmaktini seinastu 70 minuttirnar.

## Sást ikki aftur

Munurin í manntalinum sást tó ikki aftur á spælinum, og yvirhøvur var talan um ein rættuliga javnan dyst.

Bert eitt mál kom í fyrra hálvleiki, og hetta fekk LÍF tá hálvleikurin var á leið hálvrunnin. Eitt hornaspark fekk loyvi at dala niður til Petur Sjúrðarberg, sum staddur heilt inni við málið fekk skumpað bóltin seinasta teinin í málið.

TB hevði eisini nakrar vandamiklar royndir, og einar tvær ferðir var nær við at Óli Johannensen kundi seta bóltin í netið, men báðu ferðirnar fekk Trygvi Olsen vart fyri atsóknunum.

## Orkaðu væl

Ein skuldi kanska hildið, at kreftirnar fóru at ganga undan hjá heimaliðnum, sum dysturin leið, men so var kortini ikki, og tá einir 10 minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki fekk Dan Mortensen javnvág í vágskálina, eftir at hann var farin einsamallur gjøgnum LÍF verjuna.

Støðan helt sær til einir 20 minuttir vóru eftir. Tá megnaði LÍF innan tríggjar minuttir at skjóta tvey mál. Í báðum førum var tað Kristian í Vágil, sum hevði seinasta orðið at siga. Fyrru ferðina eftir horna, og seinnu ferðina eftir kontra, tá tvørámenn spentu bogan høgt í royndunum at javna.

Tveir minuttir eftir seinna leirvíksmálið eydnaðist tó heimaliðnum at minka um munin, tá Óli Johannesen setti brotsspark í netið.

Tvørámenn royndu framhaldandi at fáa leirvíkingar aftur, og seinasta korterið var at kalla talan um einvegis ferðslu.

Hans Mourits Foldbo, sum venur leirvíkingar, helt eisini, at hansara menn lógu í so aftarliga seinastu løtuna, og hetta gjørdi tað gjørligt hjá heimaliðnum at leggja stórt trýst á.

Mál komu tó eingi afturat, og sostatt gjørdust leirvíkingar teir fyrstu, sum fingu trý stig við sær av Tvøroyri.

## Mistu sambandið

Fyri TB merkti ósigurin, at teir fyri fyrst mistu sambandið við oddin. Tað er eingin loyna, at suðuroyingarnir hava ætlanir um at koma upp aftur í bestu deildina, og sum so er vónin fyri hesum als ikki brostin.

Um eina viku ella tvær er støðan tó kanska ein heilt onnur, og tvørámenn munnu eisini vera fult vitandi um hetta, og fara teir tí helst at leggja nógv fyri komandi dystirnar.

Leirvíkingar hava nú eftir eina heldur laka byrjan strítt seg upp eftir stigatalvuni, og hóast fleiri av leikarunum eru ungir og óroyndir, so sær framtíðin kanska ikki so galin út.

Kunnu teir vísa størri støðufesti í spæli sínum, er í øllum førum ikki óhugsandi, at teir aftur í ár verða millum liðini, sum skulu hava heiðursmerki, tá avtornar, og so verður spurningurin, hvussu hesi síggja út.

## TB-LÍF 2-3 (0-1)

0-1: Petur Sjúrðarberg
1-1: Dan Mortensen
1-2: Kristian í Vági
1-3: Kristian í Vági
2-3: Óli Johannesen (br.)